## VIÐMERKINGAR

### En kommentar til indslaget »Abort«

**Nina Dahl**

Først til Helma. Tak! Det var flot! Dernæst, om Kvindeligt Selskab henvender sig til nogen – tror I, at en uformuende går i banken og låner penge til en abort?

Lone Barsøe ramte plet. Er man arbejdsløs, ung under uddannelse eller har en svær økonomi, har man ikke råd til diskretion, man kan altså ikke gå i banken og låne penge på særlige lempelige vilkår.

Hvorfor er der på Færøerne så mange enlige mødre? Er oplysning og prævention måske noget, der er forsømt? Jeg spørger bare. Og hvad er tilbudet til dem? Hjælper man dem i gang med en uddannelse, eller er beskeden nogenlunde sådan her: Du får løn som forskyldt!!

# Hvad er sammenhængen mellem dansk kolonialisme og færøske kvinders ret til abort?

**Karen H. Lennert, Hørsholm**
*Stud.scient.soc. i internationale relationer*

**Annika Smith**
*Frederiksberg.*
*Stud.scient.soc. i internationale relationer*

Det danske initiativ til at yde økonomisk støtte til, at færøske kvinder kan få foretaget abort i Danmark, har sat sindene i oprør på Færøerne. Nogle færøske politikere ser den danske støtte som en underkendelse af det færøske forbud mod fri abort og dermed som et udtryk for kolonialistisk tankegang idet Danmark »atter blander sig i et internt færøsk anliggende.«

Det er forståeligt når man som færing får tics ved lyden af danske kritiske røster og i ren og skær refleksreaktion manifesterer retten til selvbestemmelsen og ikke-indblanding udefra. Historien har indtil flere gange vist at det færøske folks rettigheder er blevet underkendt af den danske stat. Folkeafstemningen for løsrivelse fra Danmark 1946 er bare et eksempel.

Man bør ikke fra dansk side gøre kvinders rettigheder på Færøerne til et rigsfællesskabsanliggende, hvilket man gør, når man underkaster deres rettigheder til et spørgsmål om brugen af de danske ydelser til Færøerne. Kvinders rettigheder kan ikke reguleres via bloktilskuddet og bør ikke reduceres til et økonomisk anliggende i det hele taget. Motivationen for at blande sig skal ikke ligge i at Danmark har magt over Færøerne via bloktilskuddet, men ud fra en interesse i at fremme ligestilling. Når Konservativ Ungdom i Danmark udtaler, at Færøerne 'bare kan erklære sig selvstændige', hvis de ikke vil have indblanding, er det atter et udtryk for dansk kolonialisme. Det er klart, at man fra færøsk side reagerer mod dansk indblanding, når den ledsages af en magtdemonstration.

Dog er der tale om en alvorlig misforståelse når man fra færøsk side behandler kvinders rettigheder som et internt anliggende, der alene vedrører det færøske folk og som aktører udefra ikke må blande sig i, endsige kritisere. Kvinders rettigheder er først og fremmest et anliggende, som har basis i de internationale konventioner, som Færøerne og Danmark har tiltrådt. Det er det internationale samfunds pligt at blande sig når disse rettigheder ikke overholdes. Derfor handler det ikke om, at den danske stat underkender Færøernes interne selvbestemmelsesret, men derimod om at Færøerne, som netop efterstræber anerkendelse af deres position i det internationale samfund også må forvente, at der også bliver stillet krav til dem udefra. Det åbne demokrati muliggør netop at grupper kan hævde deres rettigheder på tværs af landegrænser.

Færøerne - og for den sags skyld Grønland - har ofte påberåbt sig rettigheder som folk og nation. Selvom man dermed fremstår som en homogen gruppe udadtil, udgør borgerne en heterogen gruppe indadtil, hvor nogle har brug for mere beskyttelse end andre, det være sig børn, homoseksuelle, kvinder i udsatte situationer, etc. Man skal derfor passe på, at man ikke ofrer de svage borgeres rettigheder på nationalismens bord i forsøget på at fremstå samlet imod en ydre magt, i dette tilfælde den danske stat.

Vi giver Høgni Hoydal ret, når han gang på gang påpeger, at rigsfællesskabet er med til at skabe ansvarsforflygtigelse på Færøerne. I denne sammenhæng er der så tale om ansvarsforflygtigelse overfor de færøske borgeres rettigheder. Diskussionen kunne derfor bruges på Færøerne til at tænke over hvilket image man ønsker at have udadtil i fremtiden, hvadenten det er som en fortsat del af rigsfællesskabet, eller som eventuelt suveræn stat. Som suveræn stat skal man nemlig ikke kun stå til regnskab overfor den danske regering, men for hele verdenssamfundet - og mest af alt sine egne borgere.

Spørgsmålet er blevet rejst af både Naser Khader og Kamal Qureshi i Danmark. Det er jo tankevækkende, at ligestillingsspørgsmålet kommer fra danskere, der ikke er vokset op med den traditionelle berøringsangst omkring rigsfællesskabets dyberegliggende moralske dilemmaer. Det gør dem måske mere klarsynede omkring dobbeltmoralen i det danske samfund, når man på den ene side fordømmer religiøse fundamentalister udadtil, mens man samtidig vælger at lade som om de ikke findes indenfor rigets grænser, i dette tilfælde på Færøerne. Det bør være på høje tid at Danmark fejer for egen dør i hele diskussionen om religiøse fundamentalisters rolle og plads i det danske rige, såvel som det internationale samfund.

# SvF á fimm rásum - ein demokratisering av sjónvarpsnetinum

**Nú avgerð er tikin um at leggja Sjónvarpið og útvarpið saman, er stundin komin at gera av, hvørjar tænastur eitt framtíðar sjónvarp skal bjóða. Mítt boð er eitt sjónvarp við fimm rásum. Einari føroyskari rás við tilfari frá núverandi SvF og privatum áhugabólkum. Harafturat fýra rásum við beinleiðis tilfari frá grannum okkara í norðurlondum. Við hesum hevði almenna sjónvarpið havt ein møguleika í kappingini ímóti Televarpinum, ið nú er farið at senda danska sjónvarpið beinleiðis í Føroyum.**



**John Johannessen**
*tinglimur fyri Javnaðarflokkin mentanarnevndin*

Ein demokratisering av sjónvarpsnetinum. Soleiðis havi eg valt at kalla mítt uppskot til eitt framtíðar føroyskt sjónvarpstilboð. Hetta uppskot er ikki viðgjørt formelt í samgonguni, men havi kortini nevnt tað nakrar ferðir fyri landsstýrismanninum í mentamálum.

Uppskotið kann kallast ein demokratisering, tí tað skapar møguleika fyri, at hyggjarin sjálvur kann vera við til at framleiða tilfarið á føroysku rásini og sleppur sjálvur at velja ímillum tilfarið frá hinum norðurlendsku rásunum.

Hetta krevur, at sjónvarpsdeildin hjá nýggja kringvarpsstovninum fær tillutaðar fimm rásir á einum digitalum sendineti. Slíkt sendinet hevur Føroya Tele útbygt í meginpartinum av landinum við 25 rásum, og netið verður støðugt útbygt. Tískil skuldið borið til at fingið fatur á fimm av hesum rásum til framtíðar føroyska sjónvarpið.

Í øllum førum verður neyðugt at útvega Sjónvarpinum nýtt sendinet. Gamla sendinetið er niðurslitið og í vanda fyri at slóka hvørja løtu. Tí er bara at vóna, at landsstýrismaðurin í mentamálum og landsstýrismaðurin í vinnumálum, sum umsitur sendinetið, megnað at finna semju um bíligastu loysnina: at geva almennu miðlunum fullan ræðisrætt á fimm av rásunum á verandi neti.

**Rás 1 - bert føroyskt**

Men hvat skulu hesar fimm rásirnar so brúkast til? Jú, eftir mínum tykki eiga vit at skipa nýggja Sjónvarpið soleiðis, at tað hevur eina primera rás, har bert føroyskt tilfar verður sent. Haldi, at vit eiga at miða ímóti, at almenna sjónvarið megnar at framleiða umleið 3 tímar av føroyskum tilfari til hvønn dag. Hetta skal sjálvsagt vera sjónvarp við professionellari dygd og sum uppfyllir Public Service skyldurnar, sum eru ásettar í Kringvarpslógini.

Síðani hava vit 21 tímar eftir av samdøgrinum, har almenna sjónvarpsdeildin ikki sjálv megnar at senda. Hesar tímarnar eiga vit at lata upp fyri privatum áhugabólkum, soleiðis at ein og hvør kann senda sítt egna sjónvarpstilfar á almenna sjónvarpsnetinum við at uppfylla ávísar treytir. Treytirnar eiga millum annað at vera, at tilfarið er reint føroyskt og at ávísur persónur í hvørjum einstakum áhugabólki ábyrgdast fyri, at tilfarið er borðbart og at landsins lógir verða hildnar. Kortini skal tað ikki setast sum treyt, at hetta tilfarið uppfyllir Public Service skyldurnar.

Við hesum hevði borið til at fingið eina føroyska rás burturav, har ein partur var professionelt framleitt sjónvarp frá almenna Kringvarpsstovninum og ein annar partur var tilfar frá ítróttarfeløgum, samkomum, ungdómsbólkum og øðrum áhugaðum. Sostatt ein almenn Public Service rás, har fólkið eisini slapp framat við sínum tilfari undir skipaðum viðurskiftum.

**Norðurlendskt sjálvtøkuborð**

Sjónvarp Føroya, sum vit kenna tað í dag, er umframt Dag og Viku og nakrar fáar sendingar afturat í høvuðsheitum ein stovnur, sum velur tað besta burtur úr skránni hjá hinum norðurlendsku sjónvarpsrásunum og sendir tað víðari til føroyingar at hyggja at. Grundarlagið er tikið undan hesum modelli, nú Televarpið kann bjóða danska sjónvarpið beinleiðis fyri bíligan penga. Hetta váttaði sjónvarpsstjórin eisini í sendingini Føroyar í dag týskvøldið.

Við fýra norðurlendskum rásum afturat føroysku rásini, hevði Sjónvarpið megnað at yvirlivað kappingina frá Televarpinum, og hyggjararnir høvdu havt møguleikan sjálvir at valt frítt ímillum norðurlendska tilfarið út grannalondum okkara. Høvdu vit DR á rás 2, RUV á rás 3, NRK á rás 4 og SVT á rás 5 hjá almenna føroyska sjónvarpinum, hevði hetta styrkt um norðurlendska samleikan, uttan at oyðileggja tað føroyska sjónvarpið, tí føroyska tilfarið hevði framvegis verið á rás 1. Samstundis høvdu vit fingið eitt nógv meira spennandi og fjøltáttað alment sjónvarpstilboð til føroysku hyggjararnar.

Sum eg skilti á Sjónvarpsstjóranum í útvarpssendingini, heldur hann eisini, at hetta er einasti gongda leið fyri eitt framtíðar sjónvarp. Tí er at vóna, at breið politisk semja sum skjótast fæst, um at skipa almenna føroyska sjónvarpið á henda hátt.



## VIÐMERKINGAR

# Suðuroyingar á Tingi og í Tinganesi

**Tom Silvurdal**
*Vági tann 01.10.04.*

Fyri stutt síðan eftirlýsti undirritaði í grein í Dimmu og Sosialinum, persónum sum kundu skaffa samband millum Suðuroy og Tinganes.

Í hesum sambandi blivu fleiri stór mál sum Suðuroyggin ynskti at tingast við F.L. umtalaði.

Enn tykist mær ikki at nakar hevur stigi fram og bjóða sær at knýta hettar samband.

Suðuroy er annars væl mannað á Tingi.À Tingi sita í løtuni 7 suðringar,og eru teir hesir.

**Samgongutinglimur**
Johan Dahl, Vágur

Henrik Old, Vágur
Kristian Magnussen,Vágur
John Johannessen, Lopra
Sverri Midjord, Tvøroyri

**Andstøðutinglimir**



Hergeir Nielsen, Vágur
Jenis av Rana, Tvøroyri

**Harumframt hava hesir konu ættaða úr Suðuroy.**
Olav Enomoto, Vestmanna
samgongutinglimur
Jørgin Niclassen, Sørvágur
samgongutinglimur

**Í Tinganesi sita í løtuni 2 suðringar og eru hesir.**
Jóannes Eidesgård, Tvøroyri, løgmaður
Hans Pauli Strøm, Vágur, landsstýrismaður

Ikki kann sigast annað enn at suðringar hava nógvar vinir í landspolitikki.

Tað sæst væl aftur á pappírinum, ongin ivi um tað.

Hvør vildi ikki verið á sama holdið sum hesir omanfyri nevndu?

Fyri knøppum mánað síðan settu teir bóltin í spæl í Vági. Við sær til dystin í Vági hevði løgmaður enn ein suðuroyarvin. Nevniliga tann frá sjónvarpi so kenda og kontanta landsstýrismann Jógvan á Lakjuni.

Sum frá øllum dystum komu fjølmiðlarnir beinanvegin við úrslitinum longu týsdagin.

Ellisheim til Vágbingar! Teir søgdu nei! Hendrik Old kundi ikki tosa í fleiri dagar eftir dystin.

Hettar var fyribils úrslitið í fjølmiðlunum.

Síðan hevur verið nógv skriving og nógvar viðmerkingar í málinum.

I vikuni sum fór kom býráðspolittikari í Vági, fram við spurningum og nøkrum tølum.

Hesin spurdi um hinar komunirnar í oynni,vóru tilreiðar at gjalda?

Eina rokning til allar komunur í Suðuroy? Var tað hetta Landsstýrið vildi í Vági !

Komunuskuldin í Suðuroy er umleið 180 mio.kr. Arbeiðsloysi er 12ári á rað rekord stórt.

Flakavirki í Vági hevur verið stongt í mong ár. Hóast kreppu í fiskivinnuni arbeiða tey framvegis fisk í Havn - bert ikki í Vági.

Ongin virðisøking av fastognum í Suðuroy hevur verið nú í tolv ár.Suðringar hava ongantið verið so fátækir sum í dag.

Løgtingsval hevur júst verið.Ein suðuroyar kreppubólkur varð settur av samgonguni eftir valdið. Kann tað passa at úrslitið hjá hesum bólki gjørdist enn ein rokning til Suðuroy.

Nú má tað vera at Føroya Landsstýri alment kemur við einum tíðindaskrivi,og kunnger fyri okum borgarum, hvat vildi Føroya Landsstýri í Vági.

Sum eitt minsta krav til hettar tíðindaskriv vil jeg heita á F.L. um at hava gjørt eina búskapar- og samfelagsliga meting av teirru ætlan Landsstýri hevði ætlanir um at fremja í Vági.

Herundir:

Hvørja búskaparliga ávirkan vildi ætlanin havt á búskapin í Suðuroy.

Hvørja ávirkan á fólkavøksturin í Suðuroy vildið ætlanin havt.

Hvussu skuldi ætlanin fíggjast.

Eina nágreinuliga tíðarætlan fyri teirru samlaðu verkætlanina.

Føroya Landsstýri hevur nógvar búskapar- og samfelagsfrøðingar í starvi. Okur suðringar hava gjøgnum tíðirnar hoyrt nógv tóm orð og tvass frá bæði Tingi og Tinganesi.

Tí fer undirritaði at taka stig til at fáa tíðindaskrivi, (tá ið tað kemur) vurdera av óheftum búskaparfrøðingi. So tykur í Tinganesi komi fram við hvat tykur hevði ætlanir um í Vági leygardagin tann 11.09.04.

P.S
Til Jóannes
Nú ert tú har tú vil vera. Banin er kritaður, og holdið er mannað.

So pípuna á hillina og niður við arbeiðshandskunum. Hvussu ofta hava suðuroyingar ikki offrað sín fyrst valda tingmann til at spæla løgmann fyri norðoyingar?

Vónandi kanst tú vísa okum surðuroyingum, at tú eisini er løgmaður hjá okum, og at tað munar at hava løgmann.

# Endurskoðan av punktgjøldum og MVG-skipanini

**Føroya Arbeiðarafelag Havnar Arbeiðsmannafelag**

Alment um skatt og gjøld, sum áløgd verða vanliga løntakaranum.

Vit kunnu staðfesta, at samlaðu almennu gjøldini (skattur, tollur, punktgjøld og mvg), sum ta almenna nú krevur frá vanliga løntakaranum, eru so stór at hetta ger tað trupult hjá einari vanligari familju við lág- ella miðalinntøku at fáa endarnar at røkka.

Vit kunnu staðfesta, at av hvørjari vunnari krónu, so krevur landskassin uml. 60 - 70 %, íroknað t.d. skatt og mvg-gjøld, og tað halda vit vera alt ov nógv.

Vit eru ikki samd við viðmerkingunum í uppritinum til Fíggjarmálaráðið, og vit skilja ikki hvat ætlanin er, tá nevnt verður á bls. 3, at arbeiðssetningurin er at gjøldini skulu endurskoðast ***"so tey verða meira brúkara- og vinnuvinarlig".***

Einki ítøkjuligt verður nevnt, um hvat liggur í nevnda setningi, men vit kunnu staðfesta, at ætlanin hevur als ikki verið at hava atlit til teir persónar í samfelag okkara, sum dagliga stríðast fyri at forvinna nokk til at uppihalda familju sínari, hóast vit meta tað átti at verið tann mest týðandi parturin av møguligum broytingum, at skipa soleiðis fyri, at hesum familjum varð veittur ein fíggjarligur lætti.

Hetta er serliga galdandi, tá tey vælbjargaðu í samfelag okkara fara at fáa størsta fyrimunin av ætlaða skattalættanum hjá verandi samgongu, meðan tey við lág- og miðalinntøkum fara at fáa munandi minni burturúr hesum skattalætta.

Støða okkara er, at mvg-gjøld ikki eiga at vera áløgd dagligum matvørum, sum vit øll hava brúk fyri, tí ein slík skipan rakar fyrst og fremst tey sum frammanundan hava trong fíggjarlig kor.

Tað er fyri okkum greitt, at veruliga endamálið við tilmælinum er at fáa fleiri krónur í landskassan, og vit meta tað sum eina undanførslu, tá nevnt verður á bls. 4 og 31 í tilmælinum, at "***Umsitingarliga er lættast fyri allar partar við sama avgjaldssatsi fyri allar vørur og tænastur....***". Hvussu ber tað til, at tey sum hava gjørt hetta tilmæli samstundis mæla til enn fleiri undantøk í lógini um punktgjøld ?? Gera somu atlit til umsitingina av skipanini seg ikki galdandi her ??

Vit halda tað eisini vera óheppið, at einki verður nevnt í tilfarinum, sum vit hava fingið, um hvørjir persónarnir eru, sum hava gjørt tilmælið, sum nú er sent út til hoyringar. Heitt verður á ráðið um at senda okkum upplýsingar, um hvørjir persónar hava orðað hetta tilmæli.

Ítøkjuligu tilmæli tykkara.

Tá mælt verður til at mvg-gjald skal gjaldast av **arbeiðsløn** í sambandi við bygging og umvæling av egnum sethúsum, so vilja vit mótmæla nevnda uppskoti.

Tað er eftir okkara meting sera lítið umhugsað at mæla til nevndu broyting, tí hetta fer at fáa sera álvarsligar fylgjur fyri okkara ungdóm, sum skal seta búgv, og tað er fyri okkum óskiljandi, at tey sum hava orðað nevnda uppskot als ikki tykist at hava hugsað um hesar avleiðingar.

Vit skulu hava í huga, at arbeiðslønin í sambandi við bygging av einum sethúsum vanliga liggur uml. kr. 400.000,00 til 600.000,00 og ætlaða lógarbroytingin vil tí før við sær ein meirkostnað, sum fer at liggja millum kr. 100.000,00 og 150.000,00.

Tá tilmælið á bls. 5 ber saman nevndu øktu útreiðslur við sparingar í sambandi við keyp av hvítvørum, sum eftir tilmælinum ikki longur skulu verða álagdar mvg-gjald, so er tað átaluvert, at einki verður nevnt um, at útreiðslurnar til vanligar hvítvørur eru rættuliga nógv lægri enn útreiðslurnar til arbeiðsløn, og at talan tí samanumtikið verður um eina munandi útreiðsluøking.

Hendan útreiðsluøking fer í stór mun at raka tey sum frammanundan eru ringast fyri fíggjarliga, tí ein tílík øking hevur ikki somu ávirkan á eina familju, sum hevur kr. 700.000,00 - 800.000,00 í ársinntøku, sum á eina familju, sum bert forvinnur kr. 200.000,00 - 300.000,00 um árið.

Enn meira asosialt verður tilmælið, tá vit kunnu staðfesta, at familjan við hægru inntøkuni harumframt fer at fáa størri fyrimun av ætlaða skattalættanum.

Somu viðmerkingar hava vit til uppskotið, um at áleggja mvg-gjald á **heilivág.**

Aftur her verður tað tey, sum frammanundan eru ringast fyri, sum fara at merkja sviðan av hesari útreiðsluøking. Enn meira ivasom er ætlaða broytingin, tá talan eisini í nógvum førum er um fólk, sum eisini dragast við heilsutrupulleikar.

Vit taka sum heild undir við, at **umhvørvisgjald** (grønt avgjald) verða løgd á dálkandi virksemi, men hetta eigur ikki at raka tilvildarligar persónar, sum t.d. arbeiðsfólk, sum ikki hava atgongd til kollektiva ferðslu og sum tí eru noydd at koyra í egnum bili til og frá arbeiði. Um broytingarnar verða gjørdar í **skrásetingargjøldum og vegskatti**, so er alneyðugt at ein skipan verður sett í gildi, sum gevur persónum, har bilurin er alneyðugur, møguleika at fáa endurgoldið part av útreiðslum teirra.

Viðvíkjandi **brenniolju-avgjøldunum**, so skulu vit gera vart við, at tær fyritreytir, sum vórðu í 80-árunum als ikki eru tilstaðar í dag, og tí vilja vit staðiliga til at nevndu avgjøld verða strikaði

Um Landsstýrið ikki vil leggja uppskot fram um avtøku av avgjaldinum á brenniolju, so er hetta enn eitt tekin um, at ætlan landsstýrisins er í fyrstu atløgu at varðveita samlaða skatta- og avgjaldstrýstið, hóast fyritreytirnar í dag eru heilt øðrvísi enn tá reglurnar um slík gjøld vórðu sett í gildi.

Viðvíkjandi **ferðaavgjaldinum**, so verður á bls. 17 nevnt, at endamálið við at áleggja hesi gjøld upprunaliga var "***.. at minka um hugin til uttanlandsferðing føroyinga, minka um peningin teir høvdu til taks at nýta í útlandinum.***".

Hetta meta vit sum formyndarí av ringasta slag, tí fyri okkum er tað ein sjálvfylgja, at ta almenna ikki eigur at leggja seg út í hvussu borgarar landsins ynskja at brúka pening sín, og aftur her eru tað tey sum frammanundan hava lægstu inntøkurnar, sum verða rakt harðast, tí her telur hvør króna.

Endaligar viðmerkingar.

Samanumtikið, so meta vit at tann partur av ætlaðu broytingunum, sum fer at økja útreiðslurnar hjá vanliga løntakaranum ikki eiga at verða framdar.

Sum nevnt frammanfyri, so er tað fyri okkum greitt, at talan í veruleikanum er um ein dulda roynd at økja um inntøkur landskassans, og harvið ein øking av samlaða skatta- og avgjaldstrýstinum í samfelag okkara, og tað vilja vit staðiliga mótmæla.

Vit vænta heldur ikki at teir partar av samgonguni, sum siga seg vilja verja áhugamálini hjá vanliga løntakaranum, fara at taka undir við slíkum lógarbroytingum, sum fer at økja um útreiðslurnar hjá vanliga føroyinginum.

Hinvegin, so meta vit tað vera átaluvert, at tey sum hava orðað hetta tilmælið ikki melda greitt út, bæði um hvørjar avleiðingarnar av ætlaðu broytingum fara at verða og eisini, at veruliga ætlanin er at økja um inntøkur landskassans.